# Talan verður um lutakast

Í hósdagsútgávu okkara skrivaðu vit, at Kyndil longu nú hevði vissað sær annað av finaluplássunum í mansútgávuni av Coca Cola-kappingini hjá monnum.

Í 90'unum varð annars gjørt av, at um felag hevði tvey lið í hálvfinaluni, skuldu hesi bæði spæla móti hvørjum øðrum. Hetta tí tað fleiri ferðir kom fyri, at tey bæði bestu kvinnuliðini hjá Neistanum spældu móti hvørjum øðrum.

Tann avgerðin hevur tó ongan tíð verið lógarfest, og í HSF halda tey ikki, at tann siðvenjan kann nýtast sum grundarlag, nú Kyndil hevur tvey manslið í hálvfinaluni.

Tí verður talan um reint lutakast hjá bæði monnum og kvinnum, og verður hetta fríggjadagin. Ætlandi skuldi hetta verða í Útvarpinum, men í verandi sáttmálatrætuni millum Kringvarpið og føroyskan ítrótt, er tann ætlanin fyribils slept. Væntandi verður lutakastið tí hildið í ÍSF-húsinum komandi fríggjadag kl. 16.

**-mørk**



*Við sínum 213 sentimetrum er Valujev ein ræðandi mótstøðumaður hjá einum og hvørjum nevaleikara. Og nú kann russiski risin eisini rópa seg heimsmeistara*

*Mynd: Scanpix*

# Russiski risin vann

Tað minti ikki sørt um scenurnar úr Rocky IV (Ivan Drago vs. Rocky Balboa), tá John Ruiz sunnunáttina fór í ringin móti russiska risanum, Nikolay Valujev.

Dysturin um WBA-meistaraheitið gekk fyri seg í Berlin, og fyri fyrstu ferð á yrkisleið síni noyddist Valujev at standa á fótinum í samfull 12 umfør. Hann hevði annars undan hesum vunnið 43 dystir á rað fyri tíð, men nógv høvdu tó funnist at russiska risanum. Sagt varð, at Valujev, sum er 213 cm og vigar 148 kilo, bert hevði dystast móti vánaligum nevaleikarum, og at Ruiz ivaleyst megnaði at taka hann.

Men hetta eydnaðist ikki. The Monster from East, var snøgt ov stórur, til at Ruiz nakran tíð veruliga fekk fatur á honum, og tá dómararnir taldu atkvøðurnar saman, hevði russiski nevaleikarin fingið flestar.

114-114, 116-113 og 116-114 ljóðaðu atkvøðurnar, men hetta vóru bæði venjarin hjá Ruiz og nógvir av áskoðarunum ósamdir í, og tí royndi venjarin hjá Ruiz, Norman Stone at stjala beltið aftan á dystin. Venjarin hjá Valujev gjørdist frá sær sjálvum, og slerdi Stone fleiri ferð í andlitið. Aftan á nógv rok, fingu trygdarfólkini tamarhald á støðuni, og ein illur Norman Stone varð fluttur burt úr ringinum. Meðan Valujev lyfti beltið upp um høvd, skrivar Ekstra Bladet.

Boksifyriskiparin Don King segði aftan á dystin, at russarin, ið hevur vunnið allar sínar 44 dystir, nú skal til USA at royna seg í veruligum stórdystum.

Stone fær ivaleyst onkra bót fyri hetta. Tí hetta er ikki fyrstu ferð at illsinti boksivenjarin ger um seg. Fyri einum ári síðan bleiv hann tveittur út úr Madison Square Garden, aftan á at hann í fleiri førum rópti ókvæmisorð og hótti dómaran í dysinum millum Ruiz og Golotta.

**-mørk**

# Klárt til endaspælið

**Eingi óvæntað úrslit vóru á skránni, tá flogbólturin endaði grundspælið um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan gjørdist um greiðar favoritt-sigrar, tá seinastu fýra dystirnir í grundspælinum í flogbólti vórðu spældir um vikuskiftið.

Hjá kvinnunum var talan um tríggjar dystir, og var tað ÍF, sum kom best burtur úr hesum. Tær vunnu leygardagin greiðan sigur í Hoyvíkarhøllini móti KÍF, og sunnudagin gjørdist talan um greiðan sigur á TB.

TB hevði annars dagin fyri verið í Klaksvík, og tó at Mjølnir gav teimum hampuliga mótstøðu, so gjørdist talan um tryggan TB-sigur.

Hjá monnunum var bara ein dystur eftir. Nøvan hevði heimadyst móti ÍF, men heldur ikki í hesi royndini eydnaðist botnliðnum at fáa nakað sett.

**Úrslit - Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Mjølnir-TB | 0-3 | (23-25, 16-25, 17-25) |
| KÍF-ÍF | 0-3 | (10-25, 19-25, 20-25) |
| ÍF-TB | 3-0 | (25-17, 25-14, 25-23) |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| Nøvan-ÍF | 0-3 | (18-25, 16-25, 11-25) |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 10 | 10 - 0 | 30 | 9 | 21 | 20 |
| 2 SÍ | 10 | 7 - 3 | 24 | 16 | 8 | 14 |
| 3 ÍF | 10 | 6 - 4 | 22 | 17 | 5 | 12 |
| 4 TB | 10 | 4 - 6 | 18 | 18 | 0 | 8 |
| 5 Mjølnir | 10 | 2 - 8 | 12 | 27 | -15 | 4 |
| 6 KÍF | 10 | 1 - 9 | 9 | 28 | -19 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 8 | 7 - 1 | 22 | 10 | 12 | 14 |
| 2 SÍ | 8 | 6 - 2 | 21 | 10 | 11 | 12 |
| 3 Mjølnir | 8 | 4 - 4 | 17 | 13 | 4 | 8 |
| 4 ÍF | 8 | 3 - 5 | 14 | 17 | -3 | 6 |
| 5 Nøvan | 8 | 0 - 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |

# Taptu oddadystin

BK Tromsø, har Rúni Weihe og Bárður B. Mikkelsen eru partur av liðnum, taptu leygardagin oddadystin í fremstu norsku deildin.

Tromsø lá undan dystinum á fyrsta plássinum í deildini, men hendan sessin setti Randaberg seg á eftir dystin. Talan varð um tryggan 3-0 sigur, sum Randaberg vann við settúrslitunum 23-25, 17-25 og 12-25.

Bárður B. Mikkelsen sigur, at talan var um eitt sera vánaligt avrik frá Tromsø. Ikki minst harmast hann um, at fleiri av royndu spælarunum ikki megnaðu at taka við ábyrgdini, tá hetta varð kravt av teimum.

- Tað, sum skuffar meg mest, er, at royndir leikarir ikki kunnu taka í egnan barm og royna at venda gongdini og fáa tað besta burturúr. Men ístaðin konsentrað seg um alt møguligt annað, so sum feilir hjá øðrum og dómararnar. Tað er langt síðani eg havi uppliva tílíkt, hvørki í Holte ella á landsliðnum var hettar at síggja, sigur Bárður um dystin. Og hetta seinasta man ikki siga so lítið, tá hugsað verður um taptu hálvfinaluna hjá landsliðnum móti Bermuda.

Sostatt endaði Tromsø á øðrum plássi í grundspælinum, men úti úr stríðnum er liðið á ongan hátt. Í endaspælinum ber jú til at vinna hetta aftur, men áðrenn komið verður so langt, stendur steypafinalan á skránni. Tann dysturin verður í spældur í Oslo tann 7. januar, og er tað Nyborg úr Bergen, sum er mótstøðuliðið. Dysturin verður vístur beinleiðis á NRK 1, so ivaleyst verða tað nógvir føroyingar, sum fara at sita við skíggjan tann dagin.

**-mørk**